Eldraráðið í Tórshavnar kommunu
Tórsgøta 21, 100 Tórshavn
eldrarad@torshavn.fo

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

# Eldraráðið 2021 – 2024

| | |
|---|---|
| Fundur: | Nr. 2 |
| Tíð: | 02-02-23 kl. 12.00 – 13.30 |
| Stað: | Tilhaldið í Tórsgøtu |

**Møtt:** Petur Rouch, skrivari, Marin Rasmussen, limur og Robert Vilhelmsen, limur. Katrin Holm og Julianna Klett kundu ikki møta.

**Fundarskrá:**

1. Eftirmeting av fundinum við Roðan 26. januar 2023
2. Viðmerkingar til viðtøkurnar
3. Ymiskt

## AD 1 Eftirmeting av fundinum við Roðan 26. januar 2023

Vit høvdu ein góðan og gevandi fund í Runavík, har alt Eldraráðið í TK uttan Katrin vóru møtt. 37 luttakarar vóru úr øllum landinum. Tey umboðaðu fólkavald eldraráð, ikki fólkavald eldrafeløg, eldrasamstørv og pensjónistafeløg.

Tí vóru fortreytirnar fyri framløgur ymiskar, tí heimildir teirra vóru so ymiskar. Munur er frá tættbygdum og fólkaríkum kommunum til kommunur, har bygdirnar liggja spjaddar. Og til smáar kommunur, har samstørv tvørtur um kommunumørk eru neyðug. Men tað hitaði at hitta hesar eldsálir, sum leggja sína orku í at gera umstøðurnar hjá okkara eldri borgarum betri.

Vit vildu ynskt eitt størri samstarv millum fólkavald eldraráð, og vit vildu ynskt, at øll øki í landinum við kommunusamstørvum fingu í lag fólkavald eldraráð.

## AD 2 Viðmerkingar til viðtøkurnar

Ætlanin var at gjøgnumganga og nærlesa viðtøkurnar fyri at fáa ymsar broytingar framdar, men av tí at vit vóru so fáment, var gjørt av at bíða við hesum til næsta fund. Tó ásannaðu við, at sum er, eru longu nú tveir eykavaldir, sum aktivt hava verið/eru í Eldraráðnum. Bjørghild segði seg úr ráðnum og hennara avloysari, Ingigerð, hevur ikki møtt í longri tíð, so Eldraráðið er nú mannað við nummar 1,3,4,5,7 á listanum yvir vald fólk. Vit eiga eisini formelt at skipa okkum av nýggjum.

## AD 3 Ymiskt

Vit tosaði um, at eitt gott hugskot hevði verið at vitja í Kollafirði, í Nólsoy og á Velbastað at kunna okkum um teirra viðurskifti á eldraøkinum.

Vit eiga at siga frá í góðari tíð, um vit ikki møta til fund.

**Eldraráðið í Tórshavnar kommunu**
**Tórsgøta 21, 100 Tórshavn**
**eldrarad@torshavn.fo**

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

Næsti fundur í Eldraráðnum verður 2. marts 2023 klokkan 13 í Tilhaldinum.

Tórshavn 5. februar 2023.

Petur Rouch,
skrivari